## Verða avtoftaðar

Fólkatalið í fleiri av útoyggjunum minkar støðugt, og hendir eingin munagóð broyting skjótt, verða onkrar av oyggjunum avtoftaðar um eini 15 ár. Tað segði skrivarin í Útoyggjafelagnum, Olga Biskopstøð, í einari sending í Útvarpinum í gjár. Hon vísti á, at fólkatalið í teimum minstu útoyggjunum er minkað 16 prosent síðani 2000. Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, segði seg eisini bera ótta fyri, at onkrar útoyggjar verða avtoftaðar.

## Mátti venda aftur

Eitt Fokker-flogfar hjá íslendska flogfelagnum Flugfélag Íslands noyddist at venda aftur, tá tað var á veg úr Reykjavík til Ísafjarðar seinnapartin í gjár. Flogfarið var júst farið á flog, tá flogskipararnir varnaðust, at nasahjólið vildi ikki upp. Teir gjørdu tí av at venda aftur til Reykjavíkar, har flogfarið setti seg í øllum góðum. Í gjár var ikki greitt, hví nasahjólið var fast. 23 ferðafólk vóru við flogfarinum umframt manningina, sum taldi trý.

# Sjókaðalin í Sandoynna fórst

**Klæmint Weihe, stjóri í SEV, sigur, at ein nýggjur kaðal í Sandoynna kostar einar 15-20 miljónir krónur, men áðrenn støða verður tikin til nýggjan kaðal, verður kannað eftir, um hin verandi kann umvælast**

ORKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í einum illveðri herfyri fór sjókaðalin hjá SEV, sum seinastu 23 árini hevur veitt Sandoynni streym av meginøkinum.

Klæmint Weihe, stjóri í SEV, sigur, at kaðalin er farin 2,7 kilometrar úr Kirkjubølandinum.

- Tað er soleiðis onkustaðni í Hestfirði, at hann er farin.

SEV-stjórin vísir á, at tá ið kaðalin fórst, var herviligt illveður um alt landið, men kortini er torført at siga heilt ítøkiliga, hví hann er farin.

### Skiftandi spenningur

- Tá ið illveður er, ólag kemur á netið, og spenningsmunur er á øllum støðum, kunnu kortslutningar henda á leiðingunum. Í slíkum føri kann tað ganga útyvir veikasta staðið, sum so slær yvir, sum Klæmint tekur til.

Hann leggur tó aftrat, at talan kann bæði vera um teknisk ella mekanisk brek.

- Tað rekur rættiliga hart í Hestfirði, og ein møguleiki er eisini, at kaðalin kann hava ligið og gnaddað um onkran stein á havsins botni – og er so farin við tíðini, sigur stjórin í SEV.

### Góð íløga

Klæmint Weihe sigur, at kaðalin, sum liggur úr Kirkjubølandinum og út í Sandoynna, hevur ligið í tilsamans 23 ár.

- Tá ið kaðalin varð lagdur út í 1984, søgdu metingar, at kundi hann liggja í 8 ár, loysti íløgan seg fíggjarliga. Nú hevur hann so ligið næstan tríggjar ferðir so leingi. Tí kunnu vit av røttum siga, at hetta hevur verið ein góð íløga, sigur hann.

Stjórin í SEV sigur, at eitt kaðalskip kemur higar í mai til aðrar uppgávur, og tá verður kannað eftir, um kaðalin í Sandoynna kann umvælast ella ikki.

### Stór íløga

Hann sigur, at um neyðugt verður at leggja nýggjan sjókaðal í Sandoynna, verður hesin neyvan lagdur út fyrr enn á sumri 2008.

Spurdur, hvussu stór íløga, ein møguligur nýggjur kaðal er, sigur Klæmint Weihe, at talan helst verður um einar 15-20 miljónir krónur.

Í Skopun hevur SEV gamla el-verkið, sum í sínari tíð syrgdi fyri streymi til sandoyingar, og tað er hetta verk, sum nú veitir streym til alla Sandoynna.

### Skjót umlegging

- Vit hava nøkur slík tiltaksverk kring landið, og tey eru hent, tá ið ólag er á streymveitingini av meginøkinum.

Klæmint Weihe sigur, at tað tekur bert stutta tíð at "starta" verkið í Skopun upp, og so koyrir alt aftur, sum hann tekur til.

- El-verkið í Skopun liggur ikki í bygdum øki, og tí órógvar tað ikki gerandisdagin í bygdini við larmi, meðan verkið koyrir, sigur stjórin í SEV.

Í illveðrinum herfyri fórst sjókaðalin, sum seinastu 23 árini hevur veitt sandoyingum streym av meginøkinum. Kaðalin er farin 2,7 kilometrar úr Kirkjubølandinum. Nú syrgir el-verkið í Skopun fyri streymi til alla oynna



- Enn vita vit ikki, um tað loysir seg at umvæla kaðalin í Sandoynna. Verður nýggjur kaðal lagdur, verður tað ikki fyrr enn á sumri 2008, sigur Klæmint Weihe, stjóri í SEV

